## Rúni skal venja FC Hoyvík

Seinnapartin leygardagin varð tað greitt, at FC Hoyvík eisini næsta ár skal verða partur av næstbestu fótbóltsdeildini. Tað varð staðfest, tá ið FC Hoyvík vann 4-0 á MB. Og um kvøldið kundi felagið kunngera, hvør skal standa á odda fyri besta fótbóltsliðnum næsta ár. Tað verður Rúni Nolsøe. Hann fer at loysa Jón Brekku av. Fyrr í summar loysti Jón Brekku Helga L. Petersen og Finn Mørk av. Rúni var í fjør venjari hjá HB. Frammanundan hevði hann havt ábyrgdina av B68 og AB, sum bæði undir hansara leiðslu fluttu upp í bestu deildina.

## Nýggja búmerkið avdúkað

Rógvi Johansen átti besta uppskotið til búmerkakappingina, sum varð útskrivað, tá nýggja FC Suðuroy skuldi hava nýtt búmerki. Enn er talan ikki um eitt felag, sum er mannað við spælarum úr allari oynni, men samstarvið í yngru deildunum og atkvøðugreiðslan, sum herfyri var á Suðuroyaportalinum, geva ábendingar um, at ein samanlegging kanska ikki so langt burturi. Og búmerkið leggur í øllum førum upp til, at øll Suðuroyggin verður savnað í eitt og sama fótbóltsfelag.

# Tey bestu

**Gylti skógvurin frá Thomas Dam Ítrótti**
**Kvinnur:** Rannvá B. Andreasen, KÍ
**Menn:** Finnur Justinussen, Víkingur

**Ársins málverji**
**Kvinnur (latið av Carello)**
Randi S. Wardum, KÍ
**Menn (Bowlinghøllin)**
Jákup Mikkelsen, KÍ

**Ársins dómari (Sosialurin)**
Petur Reinert

**Ársins venjari**
**Kvinnur (Sosialurin)**
Lennard Pedersen, AB
Menn (Rás2)
Bill McLoud Jacobsen

**Ársins stjørnuskot**
**Kvinnur (Norðoya Sparikassi)**
Ansy Sevdal, B68/NSÍ
**Menn (Prentmiðstøðin)**
Finnur Justinussen, Víkingur

**Besta spæl í 2009**
HB

**Ársins spælari**
**Kvinnur (Sunset)**
Heidi Sevdal, Víkingur
**Menn (Televarpið)**
Fróði Benjaminsen, HB



Sunnukvøldið vórðu bestu fótbóltsfólkini í 2009 kosin. Smílini vóru stór og orðini vóru ikki heilt so hørð, sum tey ofta eru á vøllinum, tá spælarar úr øllum landinum savnaðust at hugna sær eina løtu uttan fyri vøllin

Mynd: Álvur Haraldsen

NORÐOYA SPARIKASSI
Prentmiðstøðin
TELEVARPIÐ
SUNSET Boulevard